LM-098/2023

FELAGIÐ PENINGASTOVNAR

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
uvmr@uvmr.fo

Fylgiskjal 5

Dagfesting
4. februar 2024

Hoyringsskriv viðv. Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um fjarskifti

Felagið Peningastovnar hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

1. *Viðvíkjandi § 1, nr. 1 og 2 í uppskotinum:*
Í § 2, sbr. § 3, í fjarskiftislógini er ásett, hvønn lógin er galdandi fyri. Eftir okkara meting fevnir eingin av allýsingunum í § 3 í lógini um peningastovnar.

Okkara sjónarmið er sostatt, at tað má metast vera ivasamt, um fjarskiftislógin geldur fyri peningastovnar, og um Fjarskiftiseftirlitið er heimilað at brúka heimildina í § 58, stk. 2 móti peningastovnunum.

2. *Viðvíkjandi § 1, nr. 3 í uppskotinum:*
Tað er okkum ógreitt, um § 58a í uppskotinum geldur fyri peningastovnar, tá lógin annars, sum greitt frá omanfyri, eftir okkara hugsan upprunaliga neyvan geldur fyri peningastovnar.

Í § 58a, stk. 4 í uppskotinum er ásett: *"Fjarskiftiseftirlitið ger av, hvør er at meta sum týðandi veitari til samfelagstýðandi undirstøðukervi."*

Um so er, at Fjarskiftiseftirltið sambært § 58a, stk. 4 ger av, at ein peningastovnur er at meta sum týðandi veitari til samfelagstýðandi undirstøðukervi, kann Fjarskiftiseftirlitið so brúka heimildirnar í § 58a móti peningastovninum, hóast tað er ivasamt um fjarskftislógin geldur fyri peningastovnar sbr. § 2, sbr. stk. 3?

Ynskiligt hevði verið at fingið greiðu á ivamálunum í nr. 1 og 2.

Eru spurningar ella viðmerkingar, vænta vit at frætta.

Blíðar heilsanir

Jean Djurhuus
formaður